# á skipara

**ÓSAMSVAR**

*Jacob Vestergaard sigur seg ikki skilja samanhangin í tí, sum skiparin á Norðborg førir fram um ófiskaðu makrelkvotuna. – Felagið hevur í brævi boðið hesa kvotu út sum royndarkvotu, sigur landsstýrismaðurin*

*Mynd: Dávur Winther*



Norðborg í 2009, sigur hann.

Jacob Vestergaard vísir á, at makrelkvotan í fjør var býtt út á ymisku feløgini sum eginkvotur, og tilsamans lógu sløk 4.000 tons av makreli, sum Føroyar áttu í avtaluni fyri 2009, ófiskað, tá árið var umliðið.

Parturin hjá Noreg, sum lá eftir, var sløk 70.000 tons, meðan ES segði seg at eiga umleið 7.000 tons eftir.

### Vestergaard undrast

Landsstýrismaðurin sigur seg ikki sært undrast yvir úttalilsini hjá Jón Rasmussen, tí fyri fáum vikum síðan sendi Felagið Nótaskip bræv til løgmann um makrelmálið.

– Hetta bræv var eisini undirskrivað av felagnum, sum eigur Norðborg, og í hesum brævi var eitt nú kvotan, sum Norðborg ikki fiskaði í 2009, bjóðað út sum royndarkvota. Tá veitt verður av royndarkvotu, er vanligt, at Havstovan eigur lut í verkætlanunum, og tá ber ikki til frammanundan at siga, hvør sleppur at fiska.

Jacob Vestergaard sigur seg tí ikki ordiliga skilja samanhangin í tí, sum skiparin á Norðborg førir fram um hesa ófiskaðu makrelkvotu.

– Felagið Nótaskip og partur av politisku skipanini í Føroyum hava heitt á meg um at roya hetta politiska umfar, sum nú er í gongd, og fyrr enn hetta er liðugt, ætli eg mær ongar avgerðir um makrelin, sigur landsstýrismaðurin.

### Makrelur stórt virði

Jacob Vestergaard heldur annars, at samrøðan í Sosialinum við Jón Rasmussen er sera áhugaverd, nú skiparin vísir á, hvussu stórt virði í veruleikanum er í makrelinum, sum er undir Føroyum.

– Felagið Nótaskip hevur ferð eftir ferð ført fram, at makrelurin er so nógv meiri verdur, tá hann seinni um heystið kemur í norskan sjógvi. Hetta hevur verið ein av grundgevingunum fyri, at Føroyar ikki í óðum verkum, sum tað hevur verið rópt, eiga at áseta sær eginkvotu av makreli í føroyskum sjógvi.

Landsstýrismaðurin vísir til samrøðuna við Jón Rasmussen í Sosialinum, har skiparin sigur, at uppí einar 12-14 krónur kunnu fáast fyri kilo av stórum, heilfrystum makreli, um hann verður væl støddarskildur.

– Í greinini verða eisini aðrir áhugaverdir prísir nevndir, og knappliga er nú líkt til, at hetta velduga tilfeingið, sum kemur í okkara sjógv í summarmánaðunum, nú er so ómetaliga nógv vert. Hetta fegnist eg sjálvsagt um, men undri meg líka so nógv yvir, at uppsjóvarvinnan hevur verið so afturhaldandi í spurninginum um eginkvotu í 2010, sigur Jacob Vestergaard.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Nýbygningurin Tróndur í Gøtu hevur ligið leingi við bryggju í Runavíkar havn – so leingi, at kavi var í fjøllunum, tá hann koma at liggja her, og hann liggur framvegis*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fundur við ES 12. juli

## Nú bendir mangt á, at fundurin millum landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard og fiskivinnukommiserin í ES, verður í Brússel hin 12. juli

Vilmund Jacobsen

Støðan í makrelmálinum er ikki sørt undarlig.

Longu tíðliga í summar hevði landsstyrismaðurin, Jacob Vestergaard, ætlanir um at áseta Føroyum eginkvotu av makreli fyri 2010. Orsøkin til hesa støðu landsstýrismansins var, at hini londini, sum hava verið partur av strandalandaavtaluni um makrel, Noreg og ES, ikki vilja tilluta Føroyum meiri enn sløk 5% av samlaðu makrelkvotuni, meðan Noreg og ES sjálvi vilja kanna sær restina av heildarkvotuni, sum í 2009 var heili 570.000 tons.

Bæði politiska skipanin og uppisjóvarvinnan í Føroyum eru samd um, at føroyski parturin er alt ov lítil, og útspælið hjá landsstýrismanninum til samráðingarnar fyri 2010, var, at Føroyar í minsta lagi skuldu hava 15% av kvotuni.

Annars verður eingin avtala.

Men hetta vilja hvørki Noreg ella ES hoyra talan um, og tey vilja ikki hoyra talan um ein størri føroyskan part av kvotuni yvirhøvur.

Makrelur hevur broytt sítt ferðingarmynstur, soleiðis at hann í nógv størri mun enn áður ferðast í føroyskum og íslendskum sjógvi í summarmánaðunum.

Í summar hevur Havstovan so eisini – og fyri fyrstu ferð nakrantíð - fingið endaliga staðfest, at fiskurin gýtir allastaðni kring um í føroyskum sjógvi.

Tað undarliga við støðuni er, at meðan flestu føroysku uppisjóvarskipini liggja og ur, samstundis sum dýru vinnutólini, sum hesi feløg eiga, liggja bundin við bryggju, tykist mongum løgið.

Men tað hevur so sínar orsøkir, sum Felagið Nótaskip áður hevur víst á.

### Væntaður fundur

Mett hevur verið, at tað serliga er um summarið, at nógvur makrelur kann veiðast í føroyskum sjógvi.

> **... Felagið Nótaskip mælir til samráðingarleiðina, og tað er henda leið, sum nú verður roynd...**
>
> JACOB VESTERGAARD

hava ligið leingi, er tað júst Felagið Nótaskip, sum mælir landsstýrismanninum til at royna politiska samráðingarleistin fram um at áseta eginkvotu, sum hann leingi hevur ætlað sær at gera.

At tað júst eru feløgini, sum eiga uppisjóvarskipini, ið ganga á odda at halda landsstýrismanninum aftur, verið umsitingina í Føroyum og Brússel og tað, sum nú liggur í kortunum, er, at ætlaði fundurin verður 12. juli, sigur landsstýrismaðurin.

Men summarið gongur, og enn er eingin loysn fingin á trætuni millum Føroyar, Noreg og ES um makrelveiðina fyri 2010.

Eftir at samráðingarnar um strandalandaavtalu slitnaðu í London fyri fáum vikum síðan, hevur landsstýrismaðurin havt fundir við íslendska og norska fiskimálaráðharran.

Tað var uttanlandsnevndin hjá løgtinginum, sum mælti landsstýrismanninum til at royna politisku samráðingarleiðina, áðrenn nøkur endalig avgerð um áseting av eginkvotu fyri 2010 verður tikin.

Felagið Nótaskip hevur sum nevnt eisini mælt til hesa leið og leist, men eitt slíkt samráðingarumfar kann taka tíð, og serliga kann tað taka tíð at fáa í lag fund við fiskiveiðimyndugleikarnar í ES.

Í morgun, tá Sosialurin hitti landsstýrismannin í fiskivinnumálum, visti Jacob Vestergaard at siga, at ætlaði fundurin við fiskivinnukommiserin í ES helst verður hin 12. juli í Brússel.

– Leypandi samskifti hevur verið millum umsitingina í Føroyum og Brússel og tað, sum nú liggur í kortunum, er, at ætlaði fundurin verður 12. juli, sigur landsstýrismaðurin.

Fáur væntar, at nakað ítøkiligt fer at spyrjast burtur úr hesum politiska samráðingarumfari um makrelin, men tá umfarið er liðugt, hevur Jacob Vestergaard gjørt tað, sum uttanlandsnevndin hevur heitt á hann um at gera.

*vilmund@sosialurin.fo*